gult cyan magenta svart

DAGSINS MEINING

Óli Breckmann vi › umbering á landsfundi

Eftir at umbo› fyri høgraflokkar í vesturheiminum vi› táverandi Margareth Thatcher, forsætisrá›harra og okkara egna Óla Breckmann á odda, í rø›um og greinum hava fegnast um, at fólkavaldi sosialistiski forsetin í Chile, Salvadore Alliende, var› koyrdur frá vi› eitt herna›arkvett (hann var› tikin av døgum) eru gitingarnar um, hvat veruliga hendi í Chile, nú vornar vátta›ar av amerikonskum myndugleikum. Skjøl, sum eru almannakunngjørd í USA, vísa, at amerikanska stjórnin stó› beinlei›is aftan fyri bló›uga herna›arkvetti› í Chile í farnu øld. USA var vi› til at skunda undir og skapa grundarlag fyri einum kvetti, i› hev›i vi› sær, at fleiri túsund chilenar vór›u tiknir av døgum.

Kring heimin tók mótstø›a seg upp móti høgravenda herna›arst‡rinum hjá Pinochet. Tó at civilfólk í túsundatali hvurvu og vór›u tikin av døgum vór›u ta› kortini politikarar, i› stu›la›u drápsmanninum Pinochet í greinum og rø›um. Teirra millum vóru Ronald Reagan í USA, Margareth Thatcher í Onglandi, Ariel Sharon í Ísrael og Óli Breckmann í Føroyum. Nú prógv ver›a løgd á bor›i›, sum vísa, at hesi fólk hava bygt síni úttalilsi og sín politikk á eina lygn og hava úttala› seg ímóti Alliende og st‡ri hansara á fullkomiliga skeivum grundarlag, má roknast vi›, at tey fara at taka or›ini í seg aftur og koma vi› almennum umberingum.

Ta› hev›i so veri› eitt hóskandi høvi hjá formanni Fólkafloksins, Óla Breckmann, i› hevur veri› vi› í hesum harkali›i av vi›gongdum høgrapolitikarum, at komi› vi› eini umbering á landsfundi floksins hetta vikuskifti›. Eitt sindur av sjálvrannsakan hev›i avgjørt styrkt trúvir›i› hansara og vir›ingina fyri formanssessi Fólkafloksins.

Almannakunnger›ingin av skjølum í USA frá mannarættindabrotum og tilsí›usetan av øllum grundleggandi demokratiskum rættindum í Chile kundi hóskandi veri› partur av landsfundarskrá Fólkafloksins, nú nettupp forma›ur floksins bæ›i á tingi, á fólkatingi, í mi›lunum hevur brúkt so nógva orku til einvíst at fordøma Alliende og at taka undir vi› Pinochet. Kanska eru vit ov naiv at halda, at forma›urin av sínum eintingum fer at koma vi› slíkari umbering. Men man ta› ikki fara at koma sum eitt krav frá teimum mongu skilagó›u og si›iligu fólkafloksfólkunum á landsfundinum, at forma›ur teirra kemur vi› eini umbering til alt Føroya fólk fyri at hava mistiki› seg, tá hann skriva›i: "Ta› var í tøkum tíma, at Alliende fekk sekkin". Nú er so sta›fest av amerikanarum sjálvum, at teir stó›u aftanfyri bló›ugu beistager›ina, og sum forma›ur Fólkafloksins nú sjálvandi fer at taka avstand frá sum tann demokratur hann er.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Flemming sjeyti

T‡sdagin komandi, 21. november, ver›ur Flemming Mikkelsen, løgtingsm›aur fyri Sambandsflokkin í Vági, 70 ár.

Flemming er sonur Louisu Mikkelsen, og hann vaks upp hjá Lisu og Thomas Nielsen í Vági.

Vágur hevur havt sambandstingmann í nógv ár. Hóast Javna›arflokkurin í mannaminni hevur veri› nógv størstur í Su›uroynni, so hevur Sambandsflokkurin næstan altí› havt ein tingmann. Kendur úr Vági var Andreas Djurhuus, Andreas Post, sum umbo›a›i flokkin fram til 1974. Tá vann Tvøroyri tingmannin – og var› Jákup Mortensen, sáli, valdur. Men vi› vali› í 1978 var› Flemming afturvaldur, og hev›i hann sæti á ting til vali› í 1994, tá Jákup í Lopra var› valdur. Vi› seinasta løgtingsval var› Flemming Mikkelsen aftur valdur á ting, og er hann elsti ma›ur á tingi.

Flemming Mikkelsen tók realprógv í 1947. Hann lærdi til maskinsmi› tí›arskei›i› 1948-52 og hevur starvast sum maskinsmi›jur á Vágs skipasmi›ju, tey seinastu árini sum meistari.



Hann hevur veri› nevndarlimur í arbei›smannafelagnum »Framtí›ini« í nøkur ár. Limur í Vágs b‡rá› 1976-84. Nevndarlimur í Føroya Vanlukkutrygging 1982-1995. Limur í nevndini fyri grunninum fyri óarbei›sførar fiskimenn 1985-98.

Flemming er giftur Irenu Mikkelsen, dóttir Sonnu og Sommer Lognberg, Skopun. Av álitisstørvum hansara eru annars at nevna: Forma›ur í Rá›leggingarnevndini fyri Sjúkrahúsverk Føroya, tá henda var› avtikin í 1996. Limur í st‡rinum fyri Su›uroyar Sjúkrahús, tá hetta var› ni›urlagt í 1996. Nevndarlimur í Meginfelag Sjúkrakassa Føroya frá 1997.

Bergur Hansen, djóralækni

Heri Joensen, prestur

Heri Kragesteen, sálarfrø›ingur

Ingi Højgaard, løgfrø›ingur

Jens Andreassen, lækni

Jóhanna á Tjaldrafløtti, fø›slu/húsarhaldsfrø›ingur

Jón Klein Olsen, politistur

Jón Kragesteen. Fer›slutrygd

Spyrji› serfrø›ingarnar

Adressan: Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn, Fax 314720 ella teldupost: spyr@sosialurin.fo – og merki›, hvørjum tit seta spurningum.

Julianna Næs, pedagogur



Sjúr›ur Johannesen, sosialrá›gevi

Turid Thomsen, lestrarvegllei›ari

Marius Staksberg, málfrø›ingur

Tøkk

Eina hjartans tøkk fyri s‡nda samkenslu og stu›ul, tá kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

Sámal J. Høgnesen

anda›ist og var› jar›a›ur.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávur til Leguhúsi› í Nesvík.
Takk til Niels Paula prest fyri gó› og troystarrík or› í kapellinum og kirkjuni.
Takk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarsta›.
Takk fyri vitjanir, uppringingar og hjálp í sambandi vi› jar›arfer›ina.
Ein serstøk tøkk til starvsfólki› á Klaksvíkar Sjúkrahúsi fyri teirra stu›ul og umsorgan.

Fyri tey avvar›andi
Kristianna, Jóan K., Johan Z., Rólant og Regin

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt s‡ndu samkenslu, tá i› okkara kæra mamma, vermamma, omma og systir

Katrin Pállsdóttir Thomassen
Tórshavn

doy›i og var› jar›a›.
Tøkk til Ólav Rasmussen prest og kirkjutænarar, tykkum á Studentaskúlanum í Hoydølum, øllum, sum hjáptu til vi› ervi› og øllum tykkum, sum fylgdu henni til gravar.

Fyri tey avvar›andi
Elsa Johanna, Thomas Petur, Poul Christoffur og Elsa Birgitta

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Ungur tvøráma›ur basti eldi umbor› á Grønlandsfly

30 ára gamli tvøráma›urin Tór›ur Nielsen var vi› flogfarinum hjá Grønlandsfly, sum var› rakt av snarljósinum undir innflúgvingini til Kastrup. Saman vi › ø › rum basti Tór›ur glø›unum, sum stó›ust av snarljósinum

FLOGÓHAPP
Stefan í Skorini

– Knappliga var eitt ordiligt buldur av tí allar grovasta. Eg havi ongantí› uppliva› naka› slíkt fyrr. Fólk fór at rópa og skríggja, sigur Tór›ur.

Eftir at snarljósi› hev›i rakt flogfari›, seg›i flogskiparin yvir hátalaran, at hetta var bara snarljósi›, og at ta› var heilt vanligt. Hetta var› sagt fyri at sissa fer›afólki› eitt sindur eftir hvøkkin, og eisini var› sagt, at alt rigga›i, sum ta› skuldi.

– Brendaroykur brei›ir seg sí›ani í flogfarinum, sum er óvanligt, og ta› lukta›i eg beinanvegin, tí eg sat beint vi›, grei›ir Tór›ur frá

Tá fer›afólki› fekk brendaroykin í nasarnar, fór alt upp at rópa og skríggja aftur.

Tór›ur sat frammarlaga í flogfarinum í høgru sí›u, og gló›irnar uppi undir loftinum vóru eini tvey setur longri frammi í vinstra bor›i.

– Av tí at ta› var myrkt, sóu vit, at ta› gløddi uppi undir tí hvíta loftinum. Vit iva›ust eitt sindur í, hvat vit skuldu gera, tí vit vænta›u, at annar av flogskiparunum fór at koma at hyggja eftir tí. Har kom eingin, og so leyp ma›urin frammanfyri meg upp, og eg gjørdi ta› sama.

– Ein av flogternunum hevur eftir øllum at døma tosa› vi› flogskipararnar, og hon kemur aftur vi› eini øks. Vit fingu skrætt pláturnar ni›ur, men tá hon skuldi spræna á gló›irnar, vendi hon eldsløkkjaranum skeivt og fekk alt í andliti. Vit fingu tó skjótt sløkt gló›irnar.

Ni›ri á flogvøllinum stó› eitt stórt bjargingarli› tilbúgvi› at seta eina bjargingarroynd í verk, men hetta gjørdist tó ikki ney›ugt. Flogfari› trilla›i sum vant til portri›, og øll sluppu sí›ani út. Her kundi fer›afólki› fáa sálarliga kreppuhjálp eftir óhugnaligu hendingina.

Flogskiparin hev›i bo›a› frá, at eldur var í tí eina motorinum, men hetta vísti seg ikki at vera rætt. Snarljósi› hevur ávirka› tólbor›i›, sum sí›ani hevur givi› skeiv bo›.

– Ta› er ikki heilt óvanligt, at snarljósi› slær ni›ur í flogfør, og ta› eiga flogfør at klára uttan trupulleikar, sigur Tór›ur at enda, sum leg›i lei›ina heimaftur til Føroyar dagin eftir.

Øll komu frá hendingini í øllum gó›um.

Nostalgisk samkoma í ítróttarhøllini

Leygardagin fara hetjurnar frá minniliga dystinum móti Eysturríki í Landskrona at møtast í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn í sambandi vi› innandurakapping

NOSTALGI
Stefan í Skorini

Dagurin 12. september í 1990 stendur brendur í minni› hjá teimum flestu ítróttaráhuga›u. Torkil Nielsen skeyt henda dagin føroyska sigursmáli› móti Eysturríki í Landskrona.

Fyri stuttum vóru tíggju ár li›in, sí›ani eysturríkar fingu banahøgg. Nú ver›ur Landskronali›i› savna› aftur, og møguleiki ver›ur at síggja spælararnar í ítróttarhøllini á Hálsi.

Um vikuskifti› skipar HB fyri innandurakapping, og í hesum sambandi hava fyriskipararnir lokka› gamlar fótbóltsspælarar at lata seg í fótbóltsstivlarnar enn einafer›.

Leygardagin klokkan 17 og í ein hálvan tíma fara spælararnir at vera á vøllinum. Spennandi ver›ur at síggja, um teir framvegis hava bóltkynstri›, sum vit øll vita, teir einafer› høvdu. Onkur er kanska fitna›ur eitt kilo ella tvey, men teir fara óiva› at vera eins ídnir og smábørnini, sum fara at kappast í høllini um vikuskifti›.

Roysningur sæddur á Eystnesi

Fríggjadagin 10. november var› ein roysningur sæddur á Eystnesi. Ta› var ein ma›ur á einum útró›rarbáti av Strondum, sum bar eyga vi› forkunnuga gestin. Hesin roysningurin er ikki sæddur aftur, men um onkur ber eyga vi › hann, so er at venda sær til Náttúrugripasavni›

FORKUNNUG VITJAN
Stefan í Skorini

Me›an útró›rarbáturin av Strondum var staddur hjá roysninginum, lá hann á eini hellu og svam eisini. Hann sá ikki út til at vera sjúkur ella illa fyri.

Líkt er til, at hetta er ein ungur roysningur, sum er farin til stroks. Dorete Bloch av Náttúrugripasavninum sigur, at ta› er sera vanligt, at ungir kallroysningar leggja lei›ina burturfrá heimsta›num. Teir fer›ast eisini skjótt, og ta› sær næstan so skjótt sum hvalur, tá teir svimja skjótt.

Roysningar hava veri› at sæ› í Føroyum av og á, og fyri bara tveimum árum sí›ani ste›ga›i ein roysningur í Nólsoy.

Dorete Bloch sigur, at nógv skeljadjór eru millum Stongina nor›ast á Nólsoynni og Eystnes, og tí er ta› ikki løgi›, at hesin roysningurin eisini ste›gar har um lei›, tí har er naka› at eta.

Náttúrugripasavni› fekk frábo›an um roysningin fríggjadagin 10. november, men hevur einki hoyrt um roysningin sí›ani. Um onkur hevur rakt vi› roysningin, ver›a tey bi›in um at venda sær til Náttúrugripasavni› at siga frá.

Fleiri frábo›anir eru vi› strendurnar í Noregi, Danmark og Hollandi um roysningar, sum eru farnir til stroks. Roysningar liva annars vi› Svalbard og í Grønlandi.

Í september í 1982 var ein roysningur á Slættanesi, og í januar sama ár var ein á Argjum. Sí›ani er eitt langt lop til ta næstu frábo›anina, sum var í 1955, tá ein var› sæddur í Húsavík. Hetta merkir ikki, at eingin roysningur hevur veri› í Føroyum í hesi tí›ini, men bara at eingin frábo›an hevur veri›. Mikkjal á Ryggi skrivar eisini um ein roysning, sum var í Føroyum í 1934, so ta› er heldur ikki naka› n‡tt fyribrigdi.

Jóannes Eidesgaard gestarø›ari í London

GESTARØ‹ARI
Jan Müller

Tann 25. november savnast føroyingar í Bretlandi til eitt samkomu- og hugnakvøld í London, solei›is sum si›ur hevur veri› í mong ár. Føroyska felagi› í Bretlandi hevur hesafer› bo›i› formanni Javna›arfloksins, Jóannes Eidesgaard at vera gestarø›ari. Sosialurin skilur, at fitt av fólki ver›ur vi› til samkomuna, og aftur hesafer› ver›ur sjálvur aldursforsetin í føroyska felagnum, Sofus Poulsen, umbo›sma›ur, vi›. Umframt at vera gestarø›ari á Føroyakvøldinum fer forma›ur Javna›arfloksins eisini at n‡ta høvi› at vitja í bretska parlamentinum og har hitta umbo› fyri eitt nú Labour.